# Byggingin fer í gongd

**Seinastu fyrireikingarnar til nýggju háborgina hjá Føroya Tele eru lidnar, og í næstum fer sjálv byggingin í gongd. Nýggi bygningurin í Hoyvík er mettur at kosta 94 milliónir krónur**

BYGGING
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*Soleiðis fer nýggja høvuðssæti hjá Føroya Tele at síggja út. Bygningurin, ið verður tilsamans 6.606 fermetrar í trimum hæddum, fer at fevna um bæði skrivstovur, umframt teknikk- og verkstaðsbygning. 170 av teimum 250 starvsfólkunum á Føroya Tele fara at starvast í nýggja bygninginum, ið fer at kosta 94 milliónir krónur. Tað er Arkitektavirkið Árni Winther, ið hevur teknað bygningin*

Føroya Tele hevur nú endaliga gjørt sáttmála um bygging av nýggja høvuðssætinum í Hoyvík. Talan er um ein bygning, 6600 fermetrar til støddar, ið skal hýsa bæði skrivstovu, teknikk-, verkstaðs- og goymsluhølum. Tilsamans fara 170 fólk at starvast í nýggja bygninginum, tá hann verður tikin í nýtslu um stívliga tvey ár. Og tá verður alt virksemið hjá Føroya Tele, undantikið Teledepilin, savnað í høvuðssætinum á Hálsi.

Føroya Tele hevur í eina tíð fyrireikað byggingina, og nú er komið so væl áleiðis, at enterprisuavtalurnar eru undirskrivaðar, og tí kann arbeiðið fara í gongd í næstum. Føroya Tele hevur í samband við byggingina valt at royna leistin við partalag, eisini nevnt »partnering«. Tí hevur fyritøkan ikki, eins og vanligt er, bjóðað út byggingina í fak-, høvuðs- ella totalenterprisu. Í staðin hevur Føroya Tele samstarva við enterprenørfyritøkuna MT Højgaard umfram fleiri ráðgevarar, Landsbyggifelagið, Sofus M. Jacobsen og COWI Consult, um sjálva verkætlanina.

## 94 milliónir

Nú enterprisuavtalurnar eru undirskrivaðar, er neyvari prísur eisini settur á byggingina. Høvuðsenterprisuavtalan ljóðar uppá 80,5 milliónir krónur afturat hesum kemur kostnaðurin av ráðgevarum og øðrum, ið er mettur til 13,4 milliónir krónur. Sostætt ljóðar samlaða rokningin til almenna partafelagið fyri nýggja høvuðssæti uppá 93,9 milliónir krónur.

Í samband við partalagsavtaluna er kostnaðurin lagdur inn í eina sokallaða »incitamentsavtalu«, ið merkir, at um byggingin verður bíligari enn tær 93,9 milliónirnar, skulu partarnir býta sparingina ímillum sín. Sama verður gjørt, um kostnaðurin fer uppum 93,9 milliónir krónur.

Hóast stívliga 94 milliónir krónur má sigast at vera nógvir pengar fyri ein bygning, so metir Føroya Tele at talan er um eina góða íløgu. Felagið vísir á, at sum er húsast tey í seks ymiskum bygningum í høvuðsstaðnum, og tá høvuðssætið verður liðugt, verður alt virksemið, uttan Teledepilin, savnað á einum stað. Við hesum væntar Føroya Tele at spara millum tvær og tríggjar milliónir krónur í rakstrarkostnaði um árið.

Gamla Telefonverkið hevði høvuðssæti í stóra bygninginum við Tinghúsvegin, men tá felagið í 1998 varð umskipað til alment partafelag, yvirtók Føroya Tele ikki bygningin. Í fjør flutti felagið meginpartin av sínum virksemi úr bygninginum, meðan nógv útgerð, m.a. ambætarar, framvegis standa í bygninginum. Hesir skulu vera fluttir úr bygninginum, ið Løgtingið er í holt við at innrætta, í seinasta lagi 31.desember 2004. Og í fjør seldi Føroya Tele Tænastumiðstøðina við Tinghúsveg 64 til Fiskimálaráðið, og eisini har skal fyritøkan flyta út í næstum. Virksemið í hesum báðum bygningum verður alt savnað í nýggja høvuðssætinum hjá fyritøkuni, ið kemur at liggja í Hoyvík, við síðuna av verandi bygningi hjá Føroya Tele í Klingruni.

ConcerTunnello:

# Konsert á havsins botni

**Tá Vágatunnilin letur upp í týsdagin 10. desember, verður eisini ein konsert undur havbotninum á skránni. Djúpu tónarnar fara Kristian Blak og onnur at standa fyri og eisini gevur Tutl fløgu út í samband við hátíðarhaldið**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*



Vágatunnilin letur upp týsdagin og ymiskt er á skránni í samband við hátíðarhaldið fyri fasta sambandið undir Vestmannasund.

Klokkan 20 fara Kristan Blak og onnur at leika. Tiltakið verður beinrakið rópt ConcerTunello.

Teir, ið far at leika undir Vestmannasundið, eru Dávur Juul Magnussen, trombone, Heðin Z. Davidsen, guitar, Kristian Blak, keyboard, Mikael Blak, bass og Brandur Jacobsen, trummur.

Á skránni hava teir løg, sum áður eru framførd í hellum, t.d. Klæmintsgjógv. T.d. løgini Sjódregil og Marmennil.

Heðin Ziska Davidsen hevur skrivað eitt verk til Vágatunnilin og Kristian Blak hevur eisini skrivað tónleik, sum er í fleiri pørtum: Inngangur, Tunnils Jig, Mitt í, Eg havi verið niðri og Útferð, har bilhorn eru partur av ljóðsamansetingini.

Partur av manningini vitjaðu í ár í Argentina og í januar fara teir á norðurlendska konsertferð og seinni til Týsklands.

ConcerTunnello byrjar klokkan 20 og bussar koyra í samband við spælingina.

## Fløga

Framførslan í Vágatunnlinum er skipað sum partur av 25 ára haldinum hjá Tutl og í samband við konsertina verður nýggj fløga løgd fram.

Tað er fløgan »Tutl - 1977 - 2002 - 25 ár - Live«.



# P/f J.F.K. yvirtekur sp/f Pure Water

**JFK fer saman við Norðoya Sparikassa at yvirtaka virksemið á Pure Water í Klaksvík. Hetta verður gjørt, tí at úrslitið av rakstrinum á Pure Water ikki hevur verið nøktandi**

VIRKISYVIRTØKA
*Solby A. Eliasen*



*P/f JFK í Klaksvík og Norðoya Sparikassi hava gjørt eina endurreisingarætlan fyri Sp/f Pure Water, sum ikki hevur havt so góð úrslit, síðani partaeigararnir yvirtóku virksemið á heysti í ár 2000*

**Klaksvík:** Raksturin av sp/f Pure Water hevur hesi bæði árini, síðani partaeigararnir yvirtóku virkið á heysti í 2000, ikki verið nøktandi, og hevur raksturin av virkinum givið stórt hall higartil í ár. Partaeigararnir hava tí ásannað, at neyðugt var við eini umskipan av virksemi felagsins, um virkinum skuldi vera lív lagað.

Í hesum sambandi ynsktu meirilutaeigararnir í felagnum, p/f Grønanes, Eyðbjørn Poulsen, Jógvan Djurhuus og Suni Durhuus, ið áttu 73 % av partapeninginum í sp/f Pure Water, ikki at luttaka í eini endurreisingarætlan av sp/f Pure Water, men ynsktu at sleppa burturúr.

P/f J.F.K. hevur tí yvirtikið partapeningin frá hesum partaeigarunum, og hevur saman við fíggingarstovninum Norðoya Sparikassa gjørt eina endurreisingarætlan fyri felagið.

Avgjørt er, at samansjóða virksemið á Pure Water við virksemið á Kósini, soleiðis at feløgini verða løgd saman í eitt felag.

Samstundis verður kapitalgrundarlagið styrkt munandi, soleiðis at samanlagda felagið verður sterkari, verður sagt frá JFK.

Í samband við hesa umlegging, kemur p/f J.F.K. framvegis at eiga meirilutan í samanlagda felagnum, meðan Norðoya Sparikassi kemur inn sum nýggjur partaeigari.

– Við at samansjóða virksemið á hesum báðum virkjum vænta vit, at til ber at reka virkini enn meira rationelt, samstundis sum spart verður í umsiting, innkeyp, sølu við meira, og vænta vit, at við teimum tiltøkum, sum eru gjørd, at virkið hjá Pure Water longu komandi ár fer at geva eitt positivt avkast til samanlagda felagið, sigur Hanus Hansen, stjóri í JFK.

Hann leggur afturat, at eisini er tað teirra fatan, at við at leggja bæði virkini í sama felag, hevur felagið enn betri møguleikar at standa seg í harðnandi kappingini á útlendska marknaðinum.

– Hetta tí, at tey á henda hátt, kunnu tryggja keyparunum eina enn betri tænastu, við einum størri vøruúrvali, sigur hann.

– Somuleiðis gevur hetta betri møguleikar í kappingini at keypa fisk frá føroysku fiskiskipunum, sigur Hanus Hansen, sum eisini leggur dent á, at tað hevur alstóran týdning at tey 55 arbeiðsplássini á Pure Water verða varðveitt, og at virksemið á virkinum kann halda fram uttan, at støðgur kemur í.

Fyri fýra árum síðani keypti p/f JFK 95 % av partapeninginum í p/f Kósini, samstundis sum nýggjur partapeningur var settur í felagið. Virksemið á Kósini hevur síðani gingið væl, og er eginognin hesa tíðina økt við góðum 130%, og er eginognin í p/f Kósini í dag omanfyri 30 mió. kr. Samanlagda felagið kemur at hava eina eginogn uppá 42 mió.kr. og svarar hetta til ein soliditet uppá 43 %.

# Uttandura jólahugni

**Jólaløg frá hornorkestrinum, kaffi, te, Sunkist og køkur vóru á skránni uttan fyri Norðoya Sparikassa hósdagin. Gunnar Nolsøe, marknaðarleiðari, sigur, at Sparikassin hevur tikið stig til hetta fyri at seta jóladám á býarlívið frá nú av og til jóla**

JÓLAHUGNI
*Solby A. Eliasen*



*Heilt fitt av fólki savnaðist uttan fyri Norðoya Sparikassa hósdagin til eina lítla, hugnaliga jólaløtu við horntónum, kaffi og onkrum til børnini eisini*

**Klaksvík:** Rættiligur jóladámur var í býnum hóskvøldið um hálvgum seks tíðina, tá Klaksvíkar Hornorkestur byrjaði at spæla kend jólaløg. Tað var sera hugnaligt at spáka í býnum og hoyra klangin frá horntónum. Heilt fitt av fólki savnaðust uttan fyri Sparikassan at lurta, og meðan kuldin spakuliga trongdi seg inn á skinn, fingu fólk ein heitan kaffimunn ella temunn frá starvsfólkunum í Sparikassanum. Børnini fingu Sunkist og so vóru siropskøkur eisini at fáa. Sera hugnaligt og væleydnað, hóast tað ikki var tað heilt stóra tiltakið.

Onkur helt fyri, at tað skal ikki so øgiliga nógv til fyri at skapa jólahýr. Øll gleða seg jú til jóla, og tá jólatónar eru at hoyra, so verða fólk beinanvegin mint á, at jólini veruliga nærkast.

Meðan hornorkestrið spældi, stóðu børn sum vaksin og lýddu á. Onkur børn høvdu hug at syngja við, tá orkestrið spældi Gleðilig jól.

Gunnar Nolsøe, marknaðarleiðari í Norðoya Sparikassi, sigur, at Sparikassin fer at skipa fyri líknandi tiltøkum hvønn hósdag frá nú av til jóla.

– Vit ætla at hava tónleik við hvørja ferð og so kaffi og annað gott. Næstu ferð verður Silvi við, og um fjúrtan dagar verður jólamaðurin eisini, sigur hann.

Hann sigur, at hetta er eitt ískoyti frá Norðoya Sparikassa til at seta jóladám á býarlívið. Og um tað fyrsta ískoytið kann sigast, at tað eydnaðist avbera væl. Fólk sóu út til at hugna sær og njóta at standa í køldu kvøldarluftini og lýða á jólatónleik og verma seg við einum heitum munni.